inni - trygt og ómaksleyst til hús

www.inni.fo



# Dámlig hús í Syðrugøtu

**Húsini eru sjarmerandi, hugnalig og livilig**











### Ljós og luft uttan

Húsini standa í náttúruvakra umhvørvinum ovarliga í Syðrugøtu. Húsini standa í friðarligum umhvørvi við blindan veg. Sera hugnaligur urtagarður við alskyns trøum og plantum er rundan um húsini, eisini eru sólkrókar, so tú kanst njóta sólina allan dagin. Tað er sera gott útsýni yvir bygdina, Gøtuvík og Støðlafjall. Tú ert nær við náttúruna – spælipláss er beint uttan fyri køksvindeygað – parkeringsøki er til fleiri bilar.

### Stílur og snið innan

Húsini eru sera væl bygd, og innan eru tey umvæld og dagførd við lættari hond, so upprunadygdin er varðveitt.

Tá ið tú kemur inn, kennir tú sama hugnaliga huglagið. Gongin er opin og nosslig. Køkurin liggur millum eitt bryggers/vaskirúm og eina stóra hugnaliga stovu. Í ovaru hæddini er eisini eitt stórt baðirúm við baðikari, kamar, hjúnarúm við klædnarúmi og baðirúmi við brúsu. Harafturat er eitt snotuligt arbeiðsrúm. Trætrappa er úr gongini niður í niðaru hæddina. Hendan hæddin kann nýtast sum sjálvstøðug íbúð. Í niðaru hæddini er gongd, stova, køkur, 3 kømur, baðirúm við brúsu og fýrrúm/kjallararúm.

## Fakta:

**Adressa:** ............Garðagøta 3, Syðrugøta

**Býggiár:** ............1986

**Hæddir:**.............2

**Gólvvídd:** ..........240 $m^2$ búøki

**Grundøki:** .........566 $m^2$

**Prísuppskot:**......kr. 1.600.000,00





inni

P/F Inni | Niels Finsens Gøta 37 | P.O. Boks 364 | FO-110 Tórshavn | inni@inni.fo | Tlf. 320 410 | Fax 320 510